# Eitt seinasta farvæl til Rituna

**FARVÆL** 125 nólsoyingar høvdu Hvítusunnudag teknað seg til ein seinasta túr við Rituni. Góða, gamla nólsoyarferjan sigldi ein túr runt um oynna, og fyri tey allarflestu var hetta seinasti túrurin við Rituni – um hesar leiðir




**SEINASTU FERÐ**

*Tað var sum á ólavsøku, tá Ritan legði frá landi í Nólsoy Hvítusunnudag*

Leo Poulsen

Tað var ikki uttan eitt ávíst sorgblídni, at nólsoyingar søgdu farvæl við Rituna Hvítusunnudag.

Bæði tey, ið dagliga tey seinastu ártíggjuni hava ferðast um Nólsoyarfjørð við Rituni, og tey, sum sjáldan ella ongantíð eru í Havn, høvdu hendan dagin valt at gera ein seinasta túr við skipinum, sum tíðliga í anuar 1972 kom til landið at røkja siglingina millum Havnina og Skopun, men sum mongu tey seinastu árini hevur verið farleiðin hjá nólsoyingum inn á meginlandið.

Ung sum gomul nýttu høvið fyri seinastu ferð at sigla við hesum skipi, sum so trúliga hevur tænt nólsoyingum.

Onkur hevði tikið ein gittara við, men tað gjørdist ongantíð tann stóra veitslan. Til tess var túrurin helst ov nostalgiskur.



**SKIPARI**

*Karmal Olsen var skipari hendan túrin, meðan Mortan Mortensen var stýrimaður*

Nólsoyarkvinnur eru tiltiknar góðar matmøður, og teir tríggjar tímarnar, túrurin vardi, ruku øll tey gott 400 smyrjibreyðini, sum tær høvdu smurt. Tað skal so sigast, at prísurin var sámiligur: fimm krónur fyri stykið, og tað uttan mun til, um viðskerin var sjoko-látapálegg ella turt kjøt.

Ritan sigldi kortini eisini annan hvítusunnudag, men um kvøldið varð leiðin løgd suður til Vágs, har bógskrúva skal setast í umframt aðrar ábøtur, og síðani gongur leiðin norður til Hvannasund, har hon skal sigla upp á Fugloy og Svínoy í framtíðini.

Nólsoyingar bíða so eftir Ternuni, men hon loysir Teistan av, sum er til eftirlit – og so klára nólsoyingar seg við Silju Star, sum hóast alt brúkar stutta tíð um at sigla um fjørðin.

leo@sosialurin.fo



*Gutti Jacobsen, ið er hin skiparin á Rituni, var eisini við á túrinum, tó sum ferðamaður*



*Bjargingarbáturin LÍV fylgdi við Rituni runt um oynna, og teir hugnaðu sær millum annað við at seta ein mann upp á Kapilin*



*Nýggir, farnir, hálvir og heilir nólsoyingar við vitanum og búðlonini á Borðuni í baksýni*



*Summi nýttu høvið at fara við inn til Havnar á eina Café Nátúr-vitjan, áðrenn tey – fyri tey flestu galdandi – fyri seinastu ferð sigldu um Nólsoyarfjørð við Rituni*